# Bygdaráðsfundur

## Bygdaráðsfundurin 05. 12. 2011

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Bygdaráðsalurin | |
| Hjástødd vóru: | Símun Johannesen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Johannus Danielsen | x |
| | Peddy Højgaard | x |
| | Petur J. Petersen | x |
| | Jákup M. Kjeld | x |
| | Alfred Olsen - ref. | x |

**Mál nr. 170/2011 Byggimál.**

J. nr. 2011-0042-0303.

Í umsókn dagf. 22. okt. 2011, søkir Eiler Hansen, Nes, um loyvi til at flyta bygning, ið er 3,5 x 5,5 metur á trøðna hjá sær á Kirkjuhjalla, omanfyri útstykkingina við Nesveg.
Viðlagda kort vísur, hvar garagan verður plaserað, og um kommunan kemur at hava brúk fyri økinum seinni, átekur hann sær at beina garaguna burtur aftur, uttan kostna fyri kommununa.
Ætlanin er at brúka húsið at til goyma hoyggj í. Ikki til seyð.
**Tekniska nevnd mælir til, at Eiler Hansen fær loyvi til at flyta bygningin niðan á festibøin hjá sær, treytað av at hetta kann lata seg gera, tá økið er lagt út sum íbúðarøki.**
**Fíggjarnevndin mælir til, at tað skal vera ein treyt frá kommununi, at húsið skal beinast burtur, um útstykkingarætlan á økinum verður realiserað.**
**Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini samtykt.**

**Mál nr. 171/2011 Jarðarmál.**

J. nr. 2011-0048-0070.

Í umsókn dagf. 16.09.2011 søkir Eyðun Petersen, Rókavegur 18, Saltnes, um at fáa til keyps, økið sum er millum grundstykkið hjá sær og niðan til grótgarðin, ið er burtur av matr. nr. 279a.
Viðlagda tekning vísur ætlaða uppískoytisstykkið uppá 497 m².
Umhvørvisstovan hevur sent umsóknina til ummælis hjá Nes kommunu, hin 10.10.2011.
Tað er Eyðun Petersen Saltnes, matr.nr. 279b, sum biður um at fáa eitt uppískoytisstykkið frá matr.nr. 279a, sambart viðlagt kort og frágreiðing.

**Tekniska nevnd mælir til, at Eyðun Petersen fær loyvi til at keypa hetta uppískoytisstykkið, treytað av at servituttur verður tinglýstur á uppískoytisstykkið, at um kommunan hevur brúk fyri hesum økinum til alment brúk, skal Eyðun Petersen ikki kunna nokta kommununi stykkið og fyri sama prís, sum hann hevur keypt tað fyri.**
**Hetta eru somu treytir sum tilsvarandi uppískoytisstykkir eru játtaði eftir.**
**Petur J. Petersen luttók ikki í viðgerðini av málinum.**
**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**
**Petur J. Petersen var úti meðan hetta málið var viðgjørt.**

**Mál nr. 172/2011 Jarðarmál.**
J. nr. 2011-0044- 0052
Í umsókn dagf. 21.10.2011 søkir Dánjal Pauli Højgaard, Høganesvegur 5, Toftir, um loyvi til at keypa neyðugt øki, suður frá grundstykki matr. nr. 389, sum er neyðugt fyri, at hann kann gera sær atkomuveg og parkeringspláss.
Skal hetta lata seg gera, er neyðugt at víðka um grundstykkið, og søkir hann tí um at keypa óbygda økið sunnanfyri sambart viðlagda kort.
Uppískoytisstykkini vera burtur av matr. nr. 390, sum er fyrrverandi geil og 357a sum er leigutrøð.
**Tekniska nevnd mælir til, at játta loyvi til at keypa uppískoytisstykkini samsvarandi umsóknina.**
**Fíggjarnevndin mælir til at kanna um pláss framvegis er fyri einum grundstykki sunnanfyri.**
**Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 175/2011 Vegamál.**
J. nr. 2011-0044-0051
Í skrivi dagf. 28.09.2011 vísur borgari á, at fyri fleiri árum síðani, vóru savnað undirskriftir fyri at fáa ferðsluforingar á Regnavegin.
Málið hevur verið viðgjørt av teknisku nevnd fleiri ferðir, men manglandi játtan hevur verið orsøk til at málið enn ikki er avgreitt.
**Tekniska nevnd mælir til, at ferðsluforingarnar verða gjørdar fyri summarfrítíðina 2012.**
**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 184/2011 Menta- og Fíggjarmál**
J. nr. 2011-0023-0105
Forlagið Tjørnustova gevur út bókina "Havið tók teir" Hetta eru frásagnir, frá 1919-1957, um vanlukkur á sjónum, sum eru hendar føroyskum fiskimonnum. Ein partur av bókini er um "Annu" sum fórst í 1924.
**Mentanarnevndin mælir til, at kommuna keypir 10 bøkur, fyri 200,00 kr. stykkið ella í alt 2.000,00 kr.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.**
**Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 186/2011 Nýtarshald.**
J. nr. 2011-0023-0088
Mentanarnevndin mælir til at játta kr. 20.000 til nýttárshald 2011 sum Tofta Ítróttarfelag skal skipa fyri, við nýtársrøðu, fýrverkarí, sangi, cacao og bollar, og syrgir fyri, at tiltakið verður nøktandi lýst.
**Tilmælið frá Mentanarnevndini samtykt.**

**Mál nr. 187/2011 Ansingarmál.**
J. nr. 2011-0031-0123
Frítíðarskúlin hevur søkt eftir stuðli til ein næming í 20 tímar um vikuna frá 16.11.2011 til 30.06.2012.
Lønin verður samb. sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag.
Tá tíðin at søkja var úti vóru 6 umsóknir komnar til starvi.
Leiðslan fyri Frítíðarskúlan hevur viðgjørt umsóknirnar og gjørt innstilling.
**Trivnaðarnevndin mælir til, at innstillingin frá leiðsluni fyri Frítíðarskúlan verður fylgd, og at Guðrið Bertelsen, Sjóvarvegur 39, 490 Strendur, verður sett í starv.**
**Tilmælið frá Trivnaðarnevndini samtykt.**

**Mál nr. 189/2011 Fíggjarætlan fyri 2012**
J.nr.
**2. og endaliga viðgerðin av fíggjarætlanin fyri 2012 vísir hesi høvuðstøl:**

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| § 1 Kommunal Fyrisiting | 3.399.000 | 0 |
| § 2 Almanna & Heilsumál | 3.070.000 | 0 |

| | | |
|---|---|---|
| § 3 Børn & Ung | 8.973.000 | 350.000 |
| § 4 Undirvísing | 3.608.000 | 0 |
| § 5 Mentan | 2.199.000 | 0 |
| § 6 Teknisk mál | 3.172.000 | -35.000 |
| § 7 Kommunalt virki | 3.253.000 | 320.000 |
| **Rakstur/íløgur í alt** | **27.674.000** | **635.000** |

**Rakstur og íløgur í alt** **28.309.000**

| | |
|---|---|
| §20 Rentustuðul | 900.000 |
| §20 Rentuútr./inntøkur | 1.871.000 |
| §20 Persónskattur | -31.270.000 |
| §20 Felagsskattur | -1.000.000 |
| §20 Kapitaleftirløn | -380.000 |
| §20 Aðrar inntøkur | -124.000 |
| Afturgjald av skuld | 1.679.000 |
| **Í alt** | **-15.000** |

Afturgjald av skuld 1.679.000

**Endaligt úrslit 2012** **- 1.694.000**

**Barnafrádrátturin verður 5.000,00 kr. pr. barn.**
**Skattaprosentið fyri 2012 verður óbroytt 20,5 %.**

**Bygdaráðið samtykti einmælt barnarfrádráttin, skattaprosentið og fíggjarætlanina fyri 2012, við fyrstu viðgerð 07.11.2011.**
**Fíggjarætlanin var samtykt við 2. viðgerð á bygdaráðsfundi 21.11.2011.**

**Bygdaráðið kunnaði um tað endaligu samtyktu fíggjarætlanina fyri 2012.**